Stór frágreiðing frá ráðstevnu í Føroyum:

Norðurlendsku fiskivinnusamfeløgini í framtíðini

Føroyska kreppan er ikki bert búskaparlig. Hon er eisini ein socio-kulturell kreppa. Henda kreppa hevur elvt til, at tað ongantíð politiskt hevur verið møguligt at loysa mótsetningin millum føroysku bygdamentanina og eina føroyska tjóðarmentan stendur at lesa í frágreiðingini frá ráðstevnuni, sum varð hildin í Føroyum í fjør undir heitinum "Nordisk fiskersamfund i fremtiden".

aðinum. Um hann yvirhøvur hevur loyst teir grundleggjandi trupulleikar, sum fiskivinnan hevur havt at dragast við líka síðani mitt í 70-árunum, og um hesin bygnaður yvirhøvur svarar til tey krøv, ið sett verða til eina »nýmótans« fiskivinnu. S. Johansen heldur at tann núverandi bygnaður blokerar fyri teknologiskum framstigi bæði í fiskivinnuni og í aðrari vinnu, og at hann harvið eisini fordar fyri búskaparligum framstigi hjá tí føroyska búskapinum sum heild.

Michael Haldrup og Høgni Hoydal vísa á, at tað er týdningarmikið ikki bert at siggja føroysku kreppuna sum eina búskaparliga kreppu, men eisini sum eina socio-kulturella kreppu. Henda kreppa hevur elvt til at tað ongantíð politiskt hevur verið møguligt at loysa mótsetningin millum føroysku bygdamentanina og eina føroyska tjóðarmentan. Haldrup og Hoydal halda, at um hetta ikki verður loyst, so verður ongantíð møguligt at skapa politiska semju um eitt skifti, sum kann menna tann føroyska búskapin.

Gestur Hovgaard heldur at tann mest týdningarmikla orsøkin til at politisk-fyrisitingarliga skipanin ikki virkar sum hon skal er, at hon ongantíð hevur loyst mótsetningin millum miðøki og útjaðaraøki. Fyri at loysa kreppuna í tí politisk-fyrisitingarligu skipanini er tí neyðugt at loysa henda spurningin. Neyðugt er at skifta fyrisitingina av útjaðaraøkjunum út til útjaðaraøkini sjálv, men so er eisini neyðugt at sláa útjaðaraøkini saman í størri eindir.

Eisini eru aðrar greinar um føroysk viðurskifti, m.a. skrivar Ronnie Thomassen grein um hvørjir møguleikar eru, um Føroyar fara upp í ES. John Smith skrivar, at um ein loysn skal finnast á kreppuni í fiskivinnuni, so er neyðugt at broyta bygnaðin í fiskiflotanum, burtur frá trolfiskiskapi til húkafiskiskap. Jens Helgi Toftum vísir m.a. á, at Nýliga er útkomin rapport frá ráðstevnuni »Nordisk fiskersamfund i fremtiden«, ið var hildin í Norðurlandahúsinum 8.–13. aug. 1994.

Rapportin er býtt í tveir partar. Í fyrsta parti, sum eitur »vol 1: Fiskeri og fiskersamfund«, Tema Nord 1995:585, verður serligur dentur lagdur á ta búskaparligu og ta biologisku kreppuna sum tey flestu fiskivinnusamfeløg uppliva í dag. Eisini verður diskuteraðir meira generellir problemstillingar sum stýring av fiskivinnuni (umsetiligar kvotur osfr.)





Í øðrum parti, »vol 2: Smá samfund under europæisk integration«, TemaNord 1995:586, verður serliga lagdur dentur á tvey evni: 1) »bygdamenning« og ta politisku gongdina í Føroyum, 2) møguleikar hjá smáum londum í tí alsamt vaksandi altjóða samstarvi og kapping.

Í bæði 1. og 2. parti eru fleiri greinar um Føroyar. Her verður kreppan í Føroyum gjølla gjøgnumgingin og serliga verða tær ymisku krepputoysnir, sum hava verið framdar, kritiseraðar. Eisini eru fleiri uppskot um framtíðarmøguleikar. Eg skal her stutt nevna nøkur dømi.

Jesper Jespersen sigur í síni grein, at kreppuloysnin 1992/93 ikki á nakran hátt loysti ta føroysku kreppuna, men at hon bert økti skuld landskassans við uml. 2 1/2 mia. kr. J. Jespersen heldur, at føroyska fiskivinnan eigur at umskipast, við at økja um inntøkurnar í fiskivinnuni. Hetta kann bert gerast við at seta útreiðslurnar niður (lønar- og skuldarniðurskriving) og við at fremja eina sokallaða »interna devaluering«, tvs. skattan av teimum fíggjarligu ognunum. J. Jespersen heldur tó ikki hetta vera møguligt, av tí at tað frá politiskari síðu higartil ikki hevur vilji til at fremja tiltøk, sum eru móti áhugamálunum hjá ymiskum maktfullum bólkum.

Sámal T. F. Johansen setir spurnartekin við nýggja bygnaðin í fiskiídnkreppan í føroysku fiskivinnuni longu vísti seg tíðliga í áttatiárnum og at tað er henda sama strukturella kreppan, sum enn spøkir hóast ein stórur partur av fiskivinnuni er umskipaður. Eyðun Andreassen vísir á, at ein av orsøkunum til kreppuna í Føroyum er, at frástøðan millum vanlig fólk øðru megin og politikara og fyrisiting øðru megin er alt ov stórur. Jóan Pauli Joensen, ið skrivar um industrialiseringina av føroysku bygdnum og lokalan samleika, heldur, at ein av teimum grundleggjandi trupulleikunum í tí búskaparligu menningini í Føroyum hevur verið vantandi central stýring. Hetta heldur hann m.a. kemst av at føroyingar ongantíð hava havt nakran felags samleika.

Tilsamans eru 31 greinir, um Føroyar, Ísland, Grønland, Noreg, Danmark, New Foundland, ES osfr.

Sámal Tróndur Finnsson Johansen hevur ritstjórnað. Norðurlendska Ráðharraráðið hevur givið rapportina út. Norðurlendska Ráðharraráðið, Útnorðursamstarvið, Føroya Sparikassi og Landspartanevndin fyri Norður-Noreg hava fíggjað bæði ráðstevnu og útgávu. Rapportin fæst ókeypis við *skrivliga* at venda sær til:

Nordisk Ministerråd
Store Strandstræde 18
DK-1255 København K
Tlf./fax.: 033960202

